# Nýggir stuðulsmøguleikar til skúlagjaldið

TÍÐINDASKRIV
*Stuðulsstovnurin*

Í føroysku lógini um lestrarstuðul stendur í § 6 stk. 4: "Í tíðarskeiðum, tá umsøkjari hevur rætt til samsvarandi stuðul frá Statens Uddannelsesstøtte ella øðrum lestrarstuðulsskipanum, fæst ikki stuðul frá Stuðulsstovninum." Hetta merkir, at hevur lesandi rættindi til stuðul frá øðrum lestrarstuðulsskipanum, skulu hesir møguleikar roynast fyrst. Síðsta árið hava føroysk lesandi fingið tveir nýggjar møguleikar at søkja um gjaldskúlastuðul. Niðanfyri verður stutt greitt frá hesum.

### Gjaldskúlastuðulin til lesandi í Skotlandi

Á heysti 2007 hendu nakrar broytingar, sum viðførdu at øll føroysk lesandi kundu fáa skúlagjaldið á skotskum bacelorútbúgvingum goldið av skotska lestrarstuðulsstovninum SAAS. Harafturat var eisini møguleiki fyri at fáa skúlagjaldið til ávísar masterútbúgvingar goldið. Inni á heimasíðuni *www.saas.gov.uk/student_support/special_circumstances/postgrad_list.htm* sæst, hvørjar master-útbúgvingar skúlagjaldstuðul fæst til í 2008-2009. Heimasíðan hjá SAAS er *www.saas.gov.uk*

Lesandi føroyingar á bachelorútbúgvingum í Skotlandi skulu tí vanliga søkja SAAS um stuðul til skúlagjaldið og ikki Stuðulsstovnin. Lesandi føroyingar á masterútbúgvingum í Skotlandi skulu kanna um teirra útbúgving er á listanum (sí leinkjuna omanfyri). Um útbúgvingin er á listanum, skal tann lesandi seta seg í samband við lærustovnin og fáa staðfest, um viðkomandi er útvaldur til at fáa skúlagjaldið goldið av SAAS. Um SAAS ikki stuðlar, skal tann lesandi søkja Stuðulsstovnin.

### SU veitir skúlagjald til útvaldar lærustovnar

Frá á heysti í 2008 hevur SU sett nýggja skipan í verk, sum veitir skúlagjald til lesandi á ávísum útbúgvingarstovnum uttanlands. Fyri at kanna um tín útbúgving er ein av hesum, far inn á *www.su.dk* og trýst á udlandsstipendium í vinstru síðu. Um tín útbúgving og útbúgvingarstað er á einum av teimum fýra listunum á heimasíðuni (Universitetslisten,Kulturministeriets liste, Undervisnings ministeriets liste og Samarbejdsaftalelisten), skalt tú søkja SU um skúlagjaldstuðulin. Møguleiki er eisini at søkja, sjálvt um tín útbúgving ella útbúgvingarstovnur ikki er á listunum. Um SU ikki rindar ella bert rindar ein part av skúlagjaldinum er møguligt at søkja Stuðulsstovnin um tann partin, ið ikki fæst frá SU.

Vilt tú vita meira um hesa skipan far so inn á SU-heimasíðurnar (sí omanfyri) ella á *www.udlandsstipendium.dk*
Møguleiki er eisini at seta seg í samband við Altjóða Skrivstovuna www.ask.fo" *www.ask.fo* ella Stuðulsstovnin *www.studul.fo* um ivamál eru.

Áheitan á øll, ið lesa undir ÚSUN-skipanini og øll, ið ætla at nýta skipanina framyvir

Heitt verður á øll lesandi í ÚSUN-skipanini at kanna omanfyrinevndu møguleikar. Heitt verður eisini á øll, ið ætla sær út um norðurlond at lesa, at fara tíðliga í gongd við at kanna og søkja lestrarstuðulsstovnarnar, bæði SU, Stuðulsstovnin og SAAS, av tí at viðgerðartíðin ofta er fleiri mánaðir. Ikki minst er viðgerðartíðin hjá SU ógvuliga long í sambandi við SU-góðkenning av útbúgvingum. Og Stuðulsstovnurin kann ikki veita stuðul fyrr enn útbúgvingin er góðkend.

# Fólk eru troytt av klandri

HERI MOHR



...segði nýklakti løgmaðurin, Kaj Leo Johannesen frá løgtingsins røðarapalli seinasta fríggjadag. Hendan hansara fyrsta røða var virðilig og greið við adressu til alt Føroya fólk, soleiðis sum tað sømir seg einum røttum løgmanni:

Tey flestu harmast um, at politisku ósemjurnar fylla so nógv hvønn dag, tí í veruleikanum eru vit ikki so ósamd, sum vit halda. Vit virða jú øll dygdirnar hjá hvørjum øðrum. Vit savnast á stevnum og festivalum, vit savnast í samkomum og til ítróttartiltøk. Vit savnast at arbeiða saman og skemta okkum saman. Her er einki galið við okkara samanhaldi.

Samanumtikið ein røða merkt av føroyskari siðmenning og eggjandi áræði, tjóðskaparliga mergjað, men fjar frá nationalistiskum fjákalótum, sum kunnu koma okkum aftur um brekku.

Í ávísan mun kann røðan minna eldri og gomlum fólki á farnar aðalsmenn í løgtinginum: Jóannes Patursson, Hans Iversen, Louis Zachariasen, Peter Mohr Dam og Hanus við Høgadalsá fyri bert at nevna ein úr hvørjum flokki. Fyri 46 (?) árum síðani kom táverandi landsstýrismaður við fíggjarmálum, Kristian Djurhuus yvir á Føroya Gjaldstovu, sum helt til í "Rosuborg" á Kongabrúnni (Rosa var gift við Husted-Andersen, sum bygdi húsið), og bjóðaði øllum, sum starvaðust á stovninum, kaffi og smákøkur. Í lítlari røðu greiddi hann frá, hvussu neyðugt arbeiðssemi, dissiplinur og loyalitetur er í landsins høvuðsfyrisiting, um hon skal vera vælvirkandi. Vónandi fer okkara landsstýri aftur at virka undir slíkum umstøðum.

Í bókini Færøsk Selvstyre, sum Jóannes Patursson gav út í Keypmannahavn í 1931, kunnu vit lesa stevnuskránna hjá Sjálvstýrisflokkinum (alias Vinnuflokkurin, alias Fólkaflokkurin) við 11 punktum. Tað er ikki ov nógv sagt, at Fólkaflokkurin hevur megnað at loyst stevnuskránna, sum Jóannes bóndi ætlandi var pápi at, so at siga út í æsir. Gomul stríðsmál millum táverandi flokkar eru so statt í stóran mun úti av verðini.

Føroya fólk, illa trevsað av politiskum klandri og ótryggleika, hevur átrokandi ynski – fyri ikki at siga bøn – um, at løgtingið og landsstýrið nú tekur annað skinn um bak fyri at veita fólkinum tann tryggleikan – likamligan og sálarligan – sum krevst, fyri at øll kunnu siga, at í Føroyum er gott at búgva.

Við nýggjum, konstruktivum føroyskum politikki og dugnaligum landsstýrislimum og góðum skipara á brúnni kunnu vit røkka tað, sum verður stungið út í kortið.

Óivað ein stórur meiriluti av Føroya fólki ynskir okkara níggju landsstýrislimum við nýggjum, óroyndum løgmanni, tillukku og góðan byr.

# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN.



**Fjørutiundi partur.**

Eg nevndi um teir mongu bólkarnar av trúgvandi, vit hava í dag, sum eru komnir av menniskjans uppfinnilsum. Nýggja testamentið lærir okkum um tríggjar bólkar. Teir eru: Jødar, heidningar og samkoma Guds.
Samkoma Guds hevur nú verið síðan ápostlarnir byrjaðu at prætika. Í hesum flokki eru øll tey, sum eru komin til trúgv á Jesus Kristus og í honum hava fingið syndafyrigeving fyri alla sína synd. Í hesum flokki eru bæði Jødar og heidningar. Paulus lærir okkum í brøvum sínum nógv um samkomuna. Hann undirvísir tey trúgvandi í Efesus um , at samkoman var eitt loyndarmál, sum honum var opinberað.

Hetta kanst tú lesa um í efesusbrævinum. Her skal bert verða víst á nøkur fá vers úr hesum týdningarmikla brævi. Í 2. kapitli síggja vit, hvussu frelsan er av náði eina. Síðani vísir Paulus á ,hvussu tey sum heidningar stóðu uttan fyri alt og vóru langt burtur, meðan jødarnir áttu lyftini og vóru nær Gudi. Men nú eru tey trúgvandi eitt likam í Kristusi, bæði heidningar og jødar. Lat okkum lesa kap.2,11-18
Minnist tí, at tit áður - tit, sum vóru heidningar í holdinum og vórðu kallaðir óumskornir av hini sokallaðu umskering, sum verður gjørd í holdinum við hondini
- minnist, at tit ta tíðina stóðu uttan fyri Kristus, útistongd frá borgararætti Ísraels og lyftissáttmálunum fremmand, uttan vón og uttan Gud í heiminum!

Men nú eru í Kristi Jesusi tit, sum áður vóru langt burtur, komin nær við blóði Kristusar.

Tí Hann er friður okkara, Hann, sum gjørdi eitt av báðum og breyt niður millumgarðin, ið skilti sundur, fíggindskapin, táið Hann í holdi Sínum tók burtur boðlógina og fyriskipanir hennara, fyri at Hann í Sær kundi skapa av báðum eitt nýtt menniskja og soleiðis gera frið,
og fyri at Hann við krossinum kundi í einum likami fáa báðar partar sáttar við Gud, við tað at Hann við honum drap fíggindskapin.

Hann kom og kunngjørdi tykkum frið, sum langt burtur vóru, og teimum frið, sum nær vóru.

Tí við Honum hava vit - báðir partar - í einum Anda atgongd til Faðirin.

Í næsta parti skulu vit taka nøkur vers úr 3. kapitli, har ápostulin vísir á at hetta um heidningarnar og samkomuna hevði verið eitt loyndarmál.

Framhald.

# Gekkur við útlendskum bókstavum

EYÐUN Á BORG



Teir 11 bókstavirnir í Gekkinum, sum fólk kunnu velja sær, (blátt, reytt, gult og ælabogi) eru tiknir úr útlendskum bókstavarað, ikki føroyskum!
Man tað ikki vera eindømi í heiminum, at alment sjónvarpsspæl brúkar annað stavrað enn landsins egna?
Kanska er tað ikki lógligt heldur!?
Teir útlendsku bókstavirnir eru:
a b c (mynd)
d e f g
h i j k
Teir føroysku bókstavirnir eru:
a á b (mynd)
d ð e f
g h i í

Gott í teg, Kringvarpið, broyt hatta sum skjótast!
Annars var tað hugaligt nú eitt kvøldið, meðan Gekkurin var, at hoyra eitt barn rópa há aftanfyri, tá tey bæði vaksnu so sera samd søgdu hå! Man málsliga framtíðin ikki vera bjartari?
GEKSSPEL ella
GEKKASPÆL!?
Ein gekkur, fleiri gekkar.
Er talan um ein gekk, eitur tað geksspæl og geksvertur. Er talan um fleiri gekkar, eitur tað gekkaspæl og gekkavertur.
Hvat merkir GEKKUR?
Sambært orðabókini merkir tað m.a.: íspegil, forherðingur, skemtari.
Í hesum døgum munnu gekkarnir vera fleiri í tali, eisini politiskir!
Hugsið tykkum,f øroyingar!:
1) Fogh ger seg inn á skrivstovu hjá Møller.
2) Fogh rekur Møller og stjórn úr starvi.
3) Viku seinni er Fogh fíggjarráðharri í stjórn hjá Helle!
Gekkar? Eg veit ikki.
E.S.: Til lukku við stóra geksvinninginum!
E.E.S.: Hjólsvinningarnir áttu ikki at verið minni enn 10.000 kr.!
Á Borg á Argjum á mikkjalsmessu 2008